# Fáur lýgur meira enn helvtina sigst

POUL
MICHELSEN



Men tað gjørdi Jørgin Niclasen, tá hann í útvarpinum fríggjakvøldið viðgjørdi mín persón í samband við flaggstríðið í Reykjavík.

Eg skal her gera nakrar viðmerkingar og rættleiðingar til tað, sum sagt bleiv. Eg skal ikki fara í smálutir – tað man vera tað frægasta beint nú.

Poul Michelsen hevur ikki mist nakran sess í uttanlandsnevndini, sigur Jørgin Niclasen.

Hetta er ósatt. Eg misti sessin orsaka av flaggmálinum, og Anfinn heldur fram í nevndini av somu orsøk – lat ongan iva vera um tað.

Søgan um, at eg skuldi fara í uttanlandsnevndina fyri Anfinn gongur umleið 8-9 mánaðir aftur í tíðina.

Tá varð gjørt eitt yvirlit yvir arbeiðsbýtið hjá tingmanningini.

Yvirlitið bygdi á 2005. Niðurstøðan var, at summir tingmenn høvdu alt ov nógv at gera og aðrir ov líti.

Teir sum høvdu í meira lagi vóru Anfinn Kalsberg og Óli Breckmann.

Avrátt var tí, at Óli skuldi lata fra sær Norðurlandaráðið og Anfinn uttanlandsnevndina.

Eg skuldi so fara í Uttanlandsnevndina og lata sessin í Útnorðurráðnum frá mær.

Óli Breckmann bjóðaði Poul – fyri frið skuld - sín sess í uttanlandsnevndini sigur Jørgin Niclasen.

Hetta er ikki samanhangið og beinleiðis ósatt. Eg kenni samanhangin, men skal ikki fara nærri inn á hetta. Jørgin kennir tað eisini, men eg eri vísur í, at hann heldur ikki er áhugaður í at fara inn á veruliga samanhangin.

Poul Michelsen hevur nógvar nevndasessir og KRAVDI enn fleir, sigur Jørgin Niclasen.

Hetta er ósatt.Eg havi fyri tað fyrsta ikki kravt nakað sum helst. Tað yvirlitið, sum vit gjørdi um arbeiðsbýtið í tinginum var grundarlagið.

Arbeiðsbýtið í tinginum er ikki grundað á, hvussu nógvar nevndir ein hevur, men hvussu nógv nevndirnar hava at gera, og hvørji málsøki einstøku nevndirnar ábyrgdast fyri. Summar nevndir hava ein fund um árið aðrar 50.

Alt hetta veit Jørgin, men fólk veit tað ikki og við bert at vísa til talið á nevndarsessum, gevur Jørgin eina ranga mynd av málinum.

Poul er bara órímuliga grammur var boðskapurin. Hetta er ikki so – eg haldi bara, at arbeiðsbýtið er skeivt. Eg kann siga so mikið, at hesa somu fatan høvdu aðrir tingmenn í flokkinum m. a. bæði Jørgin og Anfinn.

Poul valdi at fara uttan um flokkin við flaggmálinum, sigur Jørgin Niclasen.

Hetta er ósatt. Eg havi vent mær til bæði tingmenn, floksleiðslu, løgmann og umsiting hansara fyri at fáa steðga vanlukkuætlanini í Reykjavik.

Ein skal vera bæði blindur og deyvur, fatar ein ikki tað álvara, eg havi lagt í hetta mál.

Eg haldi meg vita, at Fólkaflokkurin í skrivandi stund ikki hevur nakra felags niðurstøðu til flaggmálið í Reykjavík. Hvussu skuldi flokkurin hjálpt mær?

Aftan á at løgmaður og m. a. eg sjálvur vóru í Reykjavík, har løgmaður og eg umrøddu málið nógv, kendi eg meg vísan í, at løgmaður fór at venda aftur til mín um, hvussu málið kundi loysast á ein nøktandi hátt. Tað gjørdi hann ikki.

Tá vanligt diplomati ikki rakk, og tíðarfreistin fyri at leggja mál fram í tinginum var við at renna út, hevði eg einki annað val enn at taka málið í egnar hendur. Og tí liggur málið soleiðis nú.

Tað skuldi frøtt meg, um Fólkaflokkurin, heldur enn at leggjast eftir mær, stuðlaði málinum og tryggjaði okkum føroyingum eina sendistovu ella umboðsstovu í Reykjavík við føroyskum eyðkenni og ongum øðrum.

Flokkurin vildi ikki ofra Anfinni Uttanlandsnevndini – ein erfarin og góður sjálvstýrispolitikkari.

Hetta er ikki satt. Eg havi ikki vilja ofrað nakran sum helst. Talan var um at umskipa arbeiðið, lætta um hjá Anfinni, og fáa betri javnvág í arbeiðið. Hetta vita floksfelagar mínir alt um – so hví bera slíkt fram í fjølmiðlunum Jørgin?

Eg haldi, at tað er ótrúligt, at Jørgin Niclasen – sigst kanska at vera komandi floksformaður – skal fara so langt. Eg eri væl greiður yvir, at vit eru í ringum skørum í løtuni, men viðhvørt skal rørast í grýtuni, og tað yvirliva vit nokk. Tó er ikki víst, at løgurin tolir, at arsinik verður koyrt í.

**Vánalig floksdiciplin?**

Eg skal viðganga, at eg í løtuni ikki gangi í takt við mínar floksfelagar á tingi. Hinvegin haldi eg meg als ikki ganga einsamallan í flokkinum.

Eg haldi meg til stevnuskrá Fólkafloksins.

At eg havi mist mín sess í uttanlandsnevndini er ein veruleiki, sum Jørgin Niclasen ikki skal lúgva seg burturúr. Nakað annað er so, at hetta er nakað, eg góðtaki, og sum eg ikki geri meira við.

Summir skulu hava upp um oyrini í tingarbeiði og tilsvarandi ávirkan. Tað verður av summum mett bæði rætt og rímuligt – kanska einamest av teimum sjálvum.

Tá aðrir bjóða seg fram, verður hetta mett sum, at ein er grammur og frekur.

So sanniliga endaði Jørgin Niclasen við at siga, at sjálvt um Poul Michelsen ikki hevði fortjent tað, so hevði hann fingið ein varalimasess aftrat.

Nú eri eg frammanundan varamaður hjá onkrum tingmanni í onkrari nevnd og skal fyri ein góðan ordan skuld upplýsa, at eg ongantíð enn í hesum valskeiðnum havi møtt á nøkrum fundi sum varamaður.

So ein varðalimasess aftrat má sigast at vera stórt gávumildni – næstan ovmikið. Takki so hjartaliga fyri stórsinni – Jørgin.

Tað er ein dagur aftur í morgin, og hann hevur størri týdning enn dagurin ígjár. Mín vón skal vera, at Fólkaflokkurin stendur saman í flaggmálinum, og at ein virðilig loysn verður funnin á hesum – ein loysn, sum flytur okkum frameftir og ikki afturum 1930. Tað er tað málið, tað snýr seg um og ikki nakað annað.

# Hvalbiartunnilin er komin á tingborð

HERGEIR
NIELSEN



Heilar tólv ferðir hava vit í andstøðuni á ymsan hátt varpað ljós á tørvin hjá Hvalbiar sókn fyri einum tunli og einum eftirskúla.

Hetta er gjørt í eini røð av fyrispurningum og játtanaruppskotum hesa tingsetuna.

Á tingborði liggja nú aftur tvey mál til tingsins viðgerð.

Løgtingsmál nr. 1-8 um eykajáttan upp á 7,5 mió. kr. til at fara undir Atlantic Adventure Eftirskúlan í Hvalba.

Og løgtingsmál nr. 1-11 Eykajáttan 2 mió.kr. til prosjektering av nýggjum tunli við tilhoyrandi vegaføring úr Trongisvági og út aftur vestan fyri Nes í Hvalba.

Landsverk er komið fram til mest hóskandi linjuføringina, og upphæddin skal nýtast til prosjektering av hesi ætlan.

Breið semja er á tingi og í landsins stýri um, at Suðuroyggin er vorðin eftirbátur í teirri stóru samfelagsmenningini, men kortini er eingin nýggj íløga løgd hagar hetta samgonguskeiðið.

Ein av virknastu bygdunum í landinum verður darvað, og fær hvørki virkað ella ment seg víðari, fyrr enn almennu Føroyar veita sóknini líkinda ferðasamband.

Hvalbiar sókn er kend fyri sítt avbera dugnaliga trolarafólk og hevur tríggjar trolarar og eitt trolvirki. Harafturat er farið undir toskaaling, og eisini eru áralongu fyrireikingarnar um Eftirskúlan í Hvalba komnar undir land.

Men tívverri er ikki komandi til bygdar við framkomnum flutningstólum. Bergholið hagar er skjótt hálvthundrað ára gamalt og lýkur á ongan hátt tíðarinnar krøv.

Rokna vit kost/nyttu útrokningar fyri Hvalbiar sókn, koma vit skjótt eftir, at almennu Føroyar hava eina upplagda skyldu at fara undir bergholið hagar beinanvegin.

Ein munandi menning fer tá at taka seg upp, og íløgan fer at rinda seg aftur eftir fáum árum til almikið gagn fyri virksemið í Hvalbiar sókn og í Suðuroynni sum heild.

Vinnulívið í Suðuroynni verður tá fyri stórum frambrotum.

Bøtt verður munandi um umstøðurnar at virka og flyta aldan tosk virkjanna millum, fisk og fiskaúrdráttir til avskipingar og trol og reiðskap millum trol- og lemmavirkini í oynni.

Ivaleyst fær kolanámsvinnan, har nýggj ætlan er í umbúna, eisini almikið gagn av hesum framtaki.

Fyrsti føroyski eftirskúlin, sum skal leggjast í Hvalba, fær sjálvandi eisini sera stóra nyttu av betri ferðasambandið hendan vegin.

Lestrarumhvørvið, næmingar og lærarar fáa aðrar og bøttar møguleikar.

Familjulívið, ítrótturin, frítíðin, ja, snøgt sagt allur trivnaður í sóknini og oynni sum heild, kemur tá í annað ljós.

Visjónin hjá landsstýrinum um at leggja hesa tunnilsgerð á ís, aftan á allar aðrar, ein hálvan mansaldur frammi í tíðini, er eitt politiskt mistak av teimum heilt stóru, og fer at níva Hvalbiar sókn niður á knøini, gerst visjónin veruleiki.

Visjónin hjá landsstýrinum frystir Hvalbiartunnilin niður ein hálvan mansaldur, og sama visjón sær als ongan tunnil til Fámjins fyri sær.

Tað er ikki so frægt, at hann verður festur á blað.

Hvat ilt suðuroyingar hava gjørt landsins kosnu monnum, er ikki gott at vita.

Vit í Tjóðveldisflokkinum síggja hinvegin landið og fólkið við heilt øðrum eygum, og mæla til beinanvegin til at fara undir at byggja land saman við vinnuliga framsóknum fjølháttaðum bygdaløgum.

Lat okkum gera tað, og so heldur leggja almenna stovuprátið á hotellunum í høvuðsstaðnum á hillina ein mansaldur ella so.

# Sandoyar tunnil í hesum valskeiðnum

GERHARD
LOGNBERG
løgtingsmaður



Tingið hevur í tveimum fyrispurningum viðgjørt Sandoyartunnilin, og er tað ein veruleiki, at viljin at gera Sandoyartunnilin er stórur.

Í morgum bar Kringvarpið tíðindi úr tinginum, og varð sagt, at álitið at gera Sandoyartunnilin kom ikki í hesi tingsetuni, og hava flest fólk sjálvsagt miskilt hesi tíðindi.

Tá sagt verður soleiðis meinast tað við, at anlegslógin kemur fram á ólavsøku.

Tað sum Bjarni Djurholm segði var:

1) at kanningarnar vórðu lidnar í mai
2) at flokkarnir skulu fáa álitið áðrenn summarsteðgin.
3) at verklagslógin skal leggjast fyri tingið á ólavsøku, og tá byrjar ein nýggj tingseta, og tað er tað, sum fólk hava misskilt.

Hetta havi eg skriftliga frá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni og løgmanni Jóannes Eidesgaard.

# Skeiva Pakkhús ein røtt avgerð

HØGNI
MIKKELSEN
Býráðslimur, Tórshavn



Tórshavnar kommuna kann ikki keypa allan miðbýðin, læt okkum fáa lív í miðbýin aftur

22. februar var býráðsfundur, har eitt av málunum var keyp av Skeiva Pakkhús, men tíbetur fall málið við 7 atkvøðum (6 vóru fyri).

Tey, ið vóru fyri at keypa tosaðu nógv um mentan, men ongin tosaði um, hvat fyri mentan skuldi inn í húsið - tá tey blivu spurd um, hvat fyri mentan, varð svarið alt møguligt.

Forkvinnan segði, at Býráðið hevði fingið í boði at keypa húsið fyri 12,5. mill. og at kommunan kundi ikki siga nei, tí at tað handlar ikki bara um pengar. Undirritaði spurdi so forkvinnuna, um hon eisini hevði verið fyri at keypt tað, um kommunan fekk tey í boði fyri 20 mió, men tað svaraði hon ikki uppá.

Leivur Hansen, býráðslimur mælti til at koyra málið í mentamálanevndina, og tað uppskotið fall (3 vóru fyri og 4 ímóti) og 6 býráðslimir tóku onga støðu, 3 av limunum í samgonguni sum sita í mentamálanevndini høvdu onga støðu, og millum tey var forkvinnan Hildur Eyðunsdóttir, so kunnu skattaborgarnir spyrja seg sjálvan hví.

Eg skilji væl hví, tí tey vita ikki, hvat húsið skal brúkast til, men tað er so lætt at keypa fyri skattaborgarans pengar.

Eg vil heita á borgarstjóran um at fylla mentan inn í øll tey gomlu húsini, sum kommunan eigur, og tey eru ikki so fá, áðrenn keypt verður meir (hann sigur, at tað er á veg). Eitt av húsunum sum kommunan hevur átt í nøkur ár er Müllers pakkhús, og tað er ikki liðugt enn, og tað sum er liðugt verður ikki brúkt nógv til mentan.

Til samgongulimirnar, ger sum Leivur Hansen og taki eina støðu sum tit halda er røtt og ikki lurta eftir borgarstjóranum, tí tá arbeiða tit fyri skattaborgarnar, og tað er tað tit eru vald til.